# Leiðslufundur 3. januar 2016

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar :<br><br><br>Avboð: | Sigurð í Jákupsstovu, Hans Pauli Joensen, Hans Andrias Sølvará, Jørgen Meitilberg, Bergur D. Hansen og Hugin Skaalum<br><br>Janus Jensen |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | týsdagur, 3. januar 2017 |
| Fundarstaður: | Setursskrivstovan |

## Mál til umrøðu:

### 1. Fíggjarætlan 2017

Tillutaða játtanin fyri 2017 áljóðandi 84.466 mió. kr. røkkur ikki til ætlaða virksemið, tað verður tí neyðugt við sparingum. Í løtuni verður kannað, hvussu raksturin kann tillagast játtanini.

Tað er neyðugt stramma munandi upp viðvíkjandi leysalæraraútreiðslum á deildunum. Dekanarnir mugu tryggja sær, at leysalæraraavtalur verða gjørdar og sendar fíggjarleiðaranum. Harumframt skulu leysalæraraútreiðslur regluliga bókast á deildunum.

### 2. Hagtøl um lestrarvirkni

Setrið hevur ov vánalig hagtøl yvir lestrarvirkni hjá lesandi, hetta er skrivið, sum varð sent Fíggjarnevndini, eitt dømi uppá. Sambært yvirlitinum er fráfallið sera høgt, men yvirlitið er ikki ætlað at vísa fráfall, men heldur, hvussu nógv lesandi eru liðugt við lesturin seinastu fimm árini. Hagtalsgrundarlagið skal styrkjast.

### 3. Umrøða KT hýsing og support til málráðið

Hýsingin og supportin skal eisini fevna um Málráðið.

### 4. Ymiskt

a. Eitt starv sum vísindaligt hjálparfólk er lýst leyst á Føroyamálsdeildini. 25 umsóknir komu til starvið. Ein setanarnevnd verður sett í næstum. Miðað verður eftir at seta starvið 1. februar 2017

b. Eitt fimm ára lektarastarv og eitt trý ára vísindastarv í heilsuvísindum eru lýst leys. Størvini verða knýtt at nýggjum granskingardepli, ið er skipaður í samstarvi millum Landssjúkrahúsið, Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Fróðskaparsetur Føroya. Miðað verður eftir at seta størvini skjótast gjørligt.